# Heitt kjak í Leirvík

**Klokkan er farin av hálvgum tíggju mikumorgunin. Tríggir dagar eru eftir, til krossurin skal setast fyri ella ímóti samanlegging millum Leirvíkar og Gøtu kommunu.**
**- Hvat kunnu teir bjóða okkum? Vit kunnu bjóða teimum sólarkaffi. Tað einasta teir kunnu bjóða okkum er eitt G! armband**

KOMMUNUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Í kaffistovuni á Statoilstøðini í Leirvík sita menn og drekka kaffi, meðan prátið gongur. Í dag er prátið um kommunusamanlegging, líka sum tað hevur verið nógvar av undanfarnu døgunum.

- Eg síggi ongan fyrimun við at leggja saman. Vit klára akkurát tað sama sjálvir.

Eftir øllum at døma, eru leirvíkingar meira ósamdir um spurningin enn gøtufólk eru.

Bygdarfólkið eftirlýsir visiónum og ætlanum fyri, hvat ein samanlegging fer at innibera fyri bygdirnar báðar.

- Vit vilja gjarna vita, hvat kommunurnar ætla at brúka samanleggingina til. So kundu vit tikið støðu til, um hetta ikki er nakað, vit kundu gjørt einsamøll, sigur ein leirvíkingur.

Starvsfólkið á kaffistovuni eru ikki á einum máli um, hvat er best at gera.

- Eg síggi ongan fordeil. Teir vilja hava okkum uppí, bara tí teir skulu byggja Gøtudal út.

- Gøtudalur verður bygdur út, sjálvt um vit ikki eru við.

- Vit kunnu bíða til seinni, tá vit noyðast at leggja saman.

- Hví kunnu vit ikki bara sjálvi leggja saman nú? – Eg eri so fyri!

Fólkið í kaffistovuni skiftist út. Kaffipausan hjá nøkrum er liðug, meðan onnur koma til.

Ein gøtumaður er millum leirvíkingarnar ið koma inn, og teir sum sita við borðini siga argandi.


Mynd: Jens Kristian Vang

- Kemur ein gøtumaður her? Vit vilja ikki síggja gøtumenn.

Helst var hetta sagt í skemti, tí gøtumaðurin sær út til, at føla seg væl til passar. Hann setir seg mitt ímillum leirvíkingarnar og er við í prátinum, sum skjótt skiftir kós og endar inni á fótbóltinum.

- Leirvíkingar hava ofta spælt í Gøtu, eingir gøtumenn hava nakrantíð verið her.

- Eg minnist fyrstu ferð eg sá Hans Mourits í GÍ klæðum, tað sá út sum hann var farin í krígsklæði.

- Nú verður tað nokk vøllurin í Gøtu sum skal brúkast, so verður tann í Leirvík nokk niðurlagdur.

- Hvar munnu vit skula velja? Í GÍ húsinum?

- Eg dugi ikki at síggja, hví tit skulu blanda GÍ og LÍF uppí hetta. Tey fara altíð at vera hvør sítt!

Nógvir leirvíkingar hava enn ikki tikið eina støðu, og ein av størstu orsøkunum tykist at vera, at tey halda seg hava fingið ov lítið at vita frá kommununi, um ætlaðu samanleggingina.

- Tey hava arbeitt við hesum í langa tíð. Eg haldi at tað er rættiliga vánaligt, at vit skulu hoyra um ætlanirnar um samanlegging sum slatur í onkrum handli í Fuglafirði.

Ónøgd er eisini millum bygdafólkið um, at tað er so stutt skotbrá, frá at tey hava fingið at vita um samanleggingina, til fólkaatkvøðan skal vera.

- Fundur var týsdagin, og nú skulu vit longu atkvøða leygardagin. Tað virkar, sum tey royna at pressa hetta ígjøgnum. Vit fáa ikki ordiliga tíð, at seta okkum inn í fyrimunirnar og vansarnar við samanleggingini, sigur ein leirvíkskona.

Nei-røddirnar eru flestar og tosa harðast á Statoilstøðini. Men hóast ja-røddirnar ikki hoyrast so væl, merkir tað ikki, at tær ikki eru til staðar. Ein av leirvíkingunum heldur at samanleggingin er eitt gott uppfinnilsi.

- Um vit skulu leggja saman við nøkrum, so skal tað vera við Gøtu.

# Vit vera ikki keypt ella seld

**Nógvir leirvíkingar halda seg ikki hava nóg góðar upplýsingar til at taka støðu til, um tað er rætt við kommunusamanlegging. Tey halda skotbráðið vera ov stutt, til at taka avgerðina. Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, skilir ikki átalurnar frá bygdafólkinum**

KOMMUNUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*


*- Vit hava avtalað, at alt verður har, sum tað er, sigur Fríðgerð Heinesen borgarstjóri í Leirvík. - Tá vit leggja saman, er tað ein spurningur um at útbyggja víðari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Vit hava roynt at kunnað borgararnar um ætlanirnar um samanlegging, millum annað við at leggja upplýsingar á okkara heimasíðu. Tá sáttmálin bleiv kunngjørdur 23. juni bleiv tað sligið rættiliga stórt upp í fjølmiðlunum, um at ein bygdarráðsfundur skuldi vera 26. juni bæði í Gøtu og Leirvík um kommunusamanlegging, og um at vit skuldu koyra ein sáttmála út til fólkaatkvøðu. Men eingin borgari í Leirvík møtti upp til fundin. Høvdu tey møtt upp til fundin, so høvdu tey eisini verið kunnaði, sigur Fríðgerð Heinesen.

- Tá spurningurin um samanlegging kom út í fjølmiðlarnar, so var hann ikki um, hvat vit ætla við hesi nýggju kommununi. Spurningurin var bara: "Hví leggja tit ikki saman við Fuglafirði?" Tað hevur víst seg, at orðaskiftið í Leirvík hevur snúð seg um júst henda spurning. Tað er ikki fyrr enn nú, fólk byrja at spyrja, hvat tað merkir, at Gøta og Leirvík leggja saman.

Í sáttmálanum um samanleggingina, hava bygdarráðini ikki skrivað nakað konkret um, hvat skal henda, eftir kommunurnar eru vorðnar ein.

## Ætlanir

*Hvat eru ætlanirnar fyri kommunurnar eftir samanleggingina?*

- Um kommunurnar verða lagdar saman, verður tað nýggja bygdaráðið, sum avgerð hvat skal gerast, sigur Fríðgerð Heinesen.

Men hon heldur, at í tíðarskeiðinum frá nú til eina møguliga samanlegging, hava sitandi bygdarráð ávirkan, kunnu samstarva og hava møguleika at gera íløgur í felag.

- Nú hava vit til dømis eitt samstarv um sløkkiliðið. Vit hava eitt sløkkilið í hvørjari av kommununum. Har kundu vit valt at lagt tey saman til eitt felags sløkkilið. Vit kundu eisini fara eitt stig víðari, og gjørt tað soleiðis, at vit eiga alt í felag. Tað er ein spurningur um, hvussu vit velja at arbeiða framyvir, um vit vita, at um kommunurnar vera ein um tvey ár, tí tá koma vit at eiga alt í felag.

Bygdarráðini hava ikki lovað hvørjum øðrum hvørji ávís ting skulu vera í hvørjari bygd, at "um vit fáa hetta, so fáa tit hatta."

- Vit hava valt at siga, at hetta er ikki sum í fleiri øðrum samanleggingum. Vit hava ikki gjørt eitt gerðabýti ella ein handil. Vit vera ikki keypt ella seld fyri at vera saman við Gøtu, sigur Fríðgerð Heinesen.

- Vit hava sagt, at Leirvík hevur stórt sæð teir hentleikar, sum vit hava brúk fyri. Tað hevur Gøta eisini, og tað kemur eisini nýtt allatíðina. Sumt skal vera í báðum bygdum, meðan aðrar íløgur áttu ikki at verið gjørdar í báðum støðum. Vit hava valt ikki at fara inn á konkretar spurningar.

## Alt verður sum tað er

*Áttu tit ikki verið meira ítøkilig, tá nú leirvíkingar eru bangnir fyri, at alt fer úr bygdini?*

- Vit hava avtalað, at alt verður, sum tað er. Skúlin verður har, sum hann er. Barnagarðurin verður har, sum hann er. Fótbóltsvøllurin verður har, sum hann er. Brandbilurin verður har, sum hann er. Vit hava ongar ætlanir um, at gera nakrar broytingar har. Vit ætla at kommunurnar skulu koyra, sum tær gera. Tá vit leggja saman, er tað ein spurningur um at útbyggja víðari.

Sum dømi nevnir Fríðgerð Heinesen, handilssentrið, ið gøtumenn eru í ferð við at gera í Gøtudali.

- Fyri okkum er tað bara ein íløga í ta nýggju kommununa. Tað er gott fyri alt økið, at gøtumenn byggja handilssentur, tað missa vit einki við. Grundarlagið fyri samanleggingini er, hvussu vit best kunnu samstarva og fáa best burturúr í felag. Og ikki at vit hugsa um at fáa mest burturúr hvørjum øðrum. Hesa áskoðan eru bygdarráðini samd um í dag.

Tá tosa er um útbyggingar, er til dømis tosað um havnabygging í Leirvík, men enn er ikki nøkur avtala komin uppá pláss um hetta.

- Vit lova ikki leirvíkingum ein nýggjan bátahyl ella okkurt annað, sum enn ikki er fingið uppá pláss, bara fyri at fáa tey at atkvøða fyri eini samanlegging, um tað vísir seg ikki at gerast veruleiki eftir samanleggingina.

Tað kommunurnar báðar hava avtalað nú er, at um tær skulu gera stórar íløgur og fara at læna pengar, so skulu tær tosa saman áðrenn, so tær ikki hvør í sínum lagi gera stórar íløgur í tey somu tingini, sum ikki er neyðug at hava í báðum bygdunum. Til dømis eina størri havn í Leirvík og eitt handilssentur í Gøtu.

## Stutt skotbrá

Fólk í Leirvík ákæra bygdarráðið fyri at royna at pressa eina samanlegging ígjøgnum, við at geva teimum so stutt skotbrá. Tey halda at tað er ov seint at borgarafundurin um samanlegging er týsdag, og at borgarin longu skal atkvøða leygardag. Men Fríðgerð Heinesen vísir hesum ákærum aftur.

- Vit hava haft tveir fundir. Ein var í Gøtu, sum bæði var fyri gøtufólk og leirvíkingar, men har vóru øðiliga fáir leirvíkingar. Fundurin týskvøldið, var ikki fyrsti fundur um málið.

- Ætlanin við at hava tveir borgarafundur var, at á tí fyrra kundu vit leggja málið fram. Síðan kundu fólk hugsa um tað, og hava høvi at møta á tí næsta fundinum og seta spurningar, um tey føldu, at teir ikki vóru svaraðir á tí fyrra, sigur Fríðgerð Heinesen.